# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo





# 200
# Vilja hava politiskar raðfestingar

Í gjár kom fløgan "Stokkhólmssyndromið" hjá loysingar punk bólkinum 200 á gøtuna. Eins og áður er politiski boðskapurin púra greiður. Teir krevja politiskar raðfestingar

Heitið á fløguni kemst av, at menninir í 200 halda, at tað er júst "Stokkhólmssyndromið" í føroyingar líða av.

Eins og vanligt er politiski boðskapurin í hásæti, og hesaferð verður langa eftir ABC samgonguni, og serstakliga Løgmanni.

- Vit vilja hava eina yvirskrift, ein boðskap ella eina ætlan, tí sum nú er, veit eingin hvat samgongan vil, sigur Niels Arge Galán.

Hóast fløgan ikki er komin í handlarnir fyrr enn í dag, so hava ávís løg av nýggju fløguni verið at hoyrt seinastu vikuna.

- Higartil hava fólk verið ótrúliga jalig um nýggju løgini, sigur Niels Arge Galán.

Hetta er kanska ikki so løgið, tí í mun til undanfarnu fløgurnar, so hava menninir í 200 lagt stóra orku í "Stokkhólmssyndromið"

- Vit byrjaðu uppá fløguna í september, og hava sostatt nýtt ótrúliga nógva orku uppá fløguna, sigur Niels Arge Galán.

Og ikki so óvæntað, so hava menninir í 200 eisini nú størri vónir um hesa útgávuna.

- Vit eru spentir at vita, hvat fólk halda um fløguna. Vit hava jú sitið við henni í nógvar mánaðir, og tá er tað gott at fáa meiningar aðrastaðni frá, sigur Niels Arge Galán.

## Ikki ov gamlir

Hóast nøkur ár eru gingin síðani 200 fyrstu ferð sá dagsins ljós, so hava menninir ongar ætlanir um at gevast í nærmastu framtíð.

Spurdur um hvørt teir ikki eru ov gamlir til at halda fram við loysingar punk tónleikinum, sigur Niels Arge Galán soleiðis.

- Vit fara aldrin at gevast. Eingin annar setur spurnartekin við politikkin í Føroyum, so vit eru noyddir at halda fram. Og tann boðskapurin sum vit hava, er á ongan hátt tengdur at aldri.

## Framleitt Riddarakrossar

Serstakt við hesari útgávuni er, at 200 eisini hava framleitt sínar egnu Riddarakrossar, ið eisini kunnu keypast í handlunum.

- Vit fara at handa Riddarakrossar til kular politikarar, sum ikki eru í Tjóðveldinum, sigur Niels Arge Galán.

Nær Riddarakrossarnir verða handaðir er enn ikki greitt, men undir øllum umstøðum ber til at ogna sær krossarnir og fløguna í handlunum.



